# Mótmæla náttúruvernd á Svalbard


Mynd: Justinus Eidesgarad

**Norsku myndugleikarnir ætla at seta fleiri náttúruverndartiltøk í verk á Svalbard, men bæði russar og norðmenn eru ímóti**

UMHVØRVI
*Árni Joensen*

Tann parturin av norska vinnulívinum, sum hevur áhugamál á Svalbard, vil ikki góðtaka verndarætlanina hjá myndugleikunum í Oslo, og tað lokala stýrið í Longyerbýnum tekur heldur ikki undir við ætlanini.

Nú hava russar so boðað frá, at teir góðtaka heldur ikki ætlanina. Russisku myndugleikarnir hava sent uttanríkisráðnum í Oslo mótmæli, og tað hevur havt við sær, at sýslumaðurin á Svalbard hevur játtað at endurskoða tann partin av ætlanini, sum viðvíkir Colesvíkini, sum russar hava serligan áhuga í.

Semja er heldur ikki um oynna Hopen. Myndugleikarnir hava skotið upp at friða alla oynna sum náttúruøki, men norsk oljufeløg hava mótmælt uppskotinum. Feløgini siga, at Hopen hevði verið sera væl egnað sum neyðug trygdarstøð hjá einari komandi oljuvinnu í norðara parti av Barentshavinum. Sýslumaðurin hevur tí skotið upp, at ein partur av oynni verður hildin uttan fyri friðingarætlanina.

Upprunaliga ætlanin hjá norsku stjórnini var at avgreiða friðingarætlanina í hesum árinum, men tað letur seg ikki gera nú.

# Toskurin í Norðsjónum er ikki í vanda

**Tað halda í hvussu er donsku fiskimenninir. Teir halda, at toskurin er farin longur norður. Enskir, skotskir og niðurlendskir fiskimenn siga tað sama**

FISKIVINNA
*Árni Joensen*



Herfyri boðaði altjóða havrannsóknarstovnurin ICES frá, at toskastovnurin í Norðsjónum er so illa fyri, at myndugleikarnir eiga at steðga fiskiskapinum.

Men hesum tekur danska fiskimannafelagið ikki undir við. Í einum brævi til fiski- og matvørumálaráðið í Keypmannahavn skrivar Michael Andersen, sum er fiskifrøðingur hjá fiskimannafelagnum, at tað er ikki neyðugt at banna monnum at fiska tosk í Norðsjónum. Fiskifrøðingurin gevur ICES rætt í, at minni toskur er at fáa í Norðsjónum nú enn fyrr, men eitt veiðibann heldur hann kortini ikki vera neyðugt.

Tað er ikki bara teir donsku fiskimenninir, sum eru ímóti tilmælinum hjá ICES, tí fiskimenninir í Skotlandi, Onglandi og Niðurlondum hava somu hugsan sum teirra donsku starvsfelagar. Fiskimannafeløgini í teimum fýra londunum hava tí spurt sínar limir, hvussu toskafiskiskapurin í Norðsjónum vignaðist fyrra hálvár í ár samanborið við fyrra hálvár í fjør. Kanningin vísir, at 36 prosent av fiskimonnunum halda, at tað var minni toskur at fáa fyrra hálvár í ár, meðan 37 prosent svaraðu, at meiri var at fáa í ár enn í fjør.

### Flytir seg

Carsten Krog, sum eisini er fiskifrøðingur hjá danska fiskimannafelagnum, sigur, at kanningin vísir eisini, at toskurin hevur flutt seg longur norður. Millum 50 og 60 prosent av teimum spurdu fiskimonnunum siga, at teir hava fingið meiri tosk har norðuri í Norðsjónum í ár enn í fjør, samstundis sum millum 40 og 50 prosent svaraðu, at minni hevur verið at fáa á teimum syðru leiðunum í ár.

Danska fiskimannafelagið sigur, at næstan allir hinir stovnarnir í Norðsjónum eru betri fyri í ár enn í fjør. Talan er um eitt nú hýsu, upsa, reyðsprøku, sild og rækjur. Hetta saman við tí ivasama tilmælinum um toskin ger, at fiskimannafelagið kann ikki taka undir við ICES um at banna toskafiskiskapinum, sigur felagið.

Toskakvotan í Norðsjónum er 50.000 tons í ár, og donsku fiskimenninir halda, at hon eigur at verða tann sama næsta ár.

# Fara at flyta markið longur út

**Norðmenn fara at flyta búskaparliga markið úr fýra út á tólv fjórðingar**

MARKNAÁSETING
*Árni Joensen*

Norska stjórnin fer um stutta tíð at leggja fram uppskot um at flyta búskaparliga markið úr teimum verandi fýra fjórðingunum út á tólv fjórðingar.

Tað upplýsti Jan Petersen, uttanríkisráðharri í einum spurnarorðaskifti í Stórtinginum fyrradagin. Hann segði, at stjórnin hevur sent uppskotið út til hoyringar, og at partarnir skulu svara stjórnini í seinasta lagi 22. november. Málið verður so ætlandi lagt fyri Stórtingið um einar tríggjar mánaðir.

Eftir uppskotinum verður tað búskaparliga norska markið flutt út á tólv fjórðingar, men harafturat kemur eitt ytra mark, sum skal røkka út á 24 fjórðingar. Jan Petersen segði, at endamálið við tí víðkaða markinum er at fáa betri eftirlit við skipaferðsluni, at verja umhvørvið og at forða fyri dálking. Hann legði afturat, at nýggja markið fer eisini at gera tað lættari hjá myndug-leikunum at forða fyri sjóvegis rúsevna- og mannasmugling.

# ítróttur

Nr. 215 • fríggjadagur • 8. november 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Tolulig uppreisn

**Áðrenn talvini mikudagin var fremsta málið hjá føroysku telvaranum at reisa seg aftur eftur tvey svíðandi stórtap. Ætlanin var púra greitt, at dysturin skuldi vinnast sannførandi. Dysturin varð eisini vunnin, men føroysku telvarnir fingu bara partvísa uppreisn, tí sigurin gjørdist ikki so sannførandi sum hann átti at verið. Føroyar vunnu 2,5-1,5 móti Sri Lanka, styrkismett nummar 103**


*Martin Poulsen var einasti føroyingurin, sum tapti móti Sri Lanka, men hóast nakað misjøvnu avrikini, so er einki at ivast í, at OL hjevur givið unglinginum hópin av dýrabarum royndum*

### John er drúgvastur

Tað er eingin ivi um at John Rødgaard er drúgvasti føroyski telvarin á hesi olympiaduni. Hann hevur telvað øll umførini uttan eitt, og hann hevur bara tapt tvey talv. Stundum hevur hann sitið á øðrum borði og stundum á fyrsta borði.

Móti Kyrgisia og aftur móti Sri Lanka sat hann á fyrsta borði. John tapti móti kyrgisanum, men hann vísti í dag, at slíkt ikki endurtekur seg. John vann sannførandi sín dyst, og tað var eingin ivi um, at hann fór at fáa fulla úrtøku.

Heini Olsen hevur eisini verið treystur í kappingini, hóast hann ikki er komin uppá 50% enn. Hann hevur havt sera harða mótstøðu. Ein stórmeistari og fimm altjóða meistarar hava sitið hinumegin borði, so Heini ger eitt stórt lop, tá næsti ratingtlistin kemur út.

Undan talvinum var greitt, at Heini hevði ein evarska lítlan møguleika at røkka sínum fyrsta IM normi, men tað gekk ikki hjá honum. Han telvaði bert javnt og kravið var púra einfalt fýra sigrar í fýra talvum. Heini royndi tó sítt ítarsta at varðveita lítla møguleikan.

Hóast talvið leingið var púra javnt, royndi Heini alt hann var mentur at koppa støðuni, men til fánýtis. Talvið var púra javnt og har gjørdist einki.

Eyðun Nolsøe hevur verið heppin í lutakastinum og fekk aftur í dag hvíta fólkið. Hann var drúgvari enn mótstøðumaðurin, sum kortini fekk javnvág í talvið eitt skiftið. Men Eyðun var knappur og settið eina fellu, sum hin steig beint í og so var talvið vunnið hjá Eyðuni.

Fjórða borð hevur roynst føroyingunum nakað misjavnt. Teir báðir unglingarnir Martin Poulsen og Hans Kristian Simonsen hava sum oftast røkt fjórða borð, men hvørgum teirra hevur eydnast at bíta seg fastan. Martin Poulsen fekk møguleikan móti Sri Lanka, men telvaði óneyvt og var við undirlutan meginpartin av talvinum. Martin treiskaðist nakað, men fekk einki burturúr og legði kongin.

### Fyrsti sigurin

Føroyar fingu sigurin sum ætlanin var, men sigurin var dekan ov lítil. Hetta var fyrsti sigur hjá Føroyum móti Sri Lanka. Dysturin var triði dysturin millum londini.

Føroyar hava nú 20,5 stig fyri 11 dystir. Trý umfør eru eftir, so skulu tey 50% røkkast sum málið er, skal føroyska liðið fáa 7,5 stig í trimum dystum og tað kann gerast trupult. Vónirnar til hetta liðið vóru stórar undan kappingini, tí hetta er sterkasta liðið nakrantíð, sum hevur umboða Føroyar á talvolympiaduni. Men um lutakastið verður heppið komandi 3 umførini, kann málið um helvtina av teimum møguligu stigunum røkkast, men longur slepst neyvan á hesi olympiaduni.

## Føroyar-Sri Lanka, 11. umfar

| | |
|---|---|
| John Rodgaard - Nirosh De Silva | 1-0 |
| Heini Olsen - G Laxman Wijesurija | 0,5-0,5 |
| Eyðun Nolsøe - T D R Pieris | 1-0 |
| Martin Poulsen - M K A Russel | 0-1 |

## Rani forsetavalevni

Í gjár varð nevnt, at Rani Nolsøe møguliga fór at vera skotin upp sum forsetið fyri FIDE økið 7, t.e. eru Norðanlondini. Í dag hava íslendingar boða frá, at teir stuðla Rana og fara at skjóta hann upp á fundinum hósdagin. Sum skilst eru danir møguliga sinnaðir at stuðla, og tað sama skulu finnar vera. Spurningurin er bara, hvat tey bæði stóru londini, Svøríki og Noreg, siga til uppskotið, og hvat kann henda á sjálvum fundinum. FIDE økið 7 er ikki tað sama sum Norðurlendska talvsambandið, men sjálvsagt er stórt samstarv. Høvuðsuppgávan er at tryggja rættindini hjá norðanlondunum í altjóða talvsambandinum, FIDE, og gera norðanlondini sjónligari á talvhválvinum.

**-js**

Tjaldur-KÍF 21-32 (11-16):

# Kollfirðingar koyra á

**Eftir sigurin á VÍF lyftu kollfirðingar seg eitt fet nærri oddinum, tá teir uttan stórevgis hóvasták bastu Tjaldri**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

KÍf nýtti mikukvøldið til at prógva, at tað als ikki er av tilvild, at liðið nú er í ferð við at toga seg upp móti ovaru liðunum á stigatalvuni. Eftir sigurin á VIF var uppgávan hesa ferð Tjaldur á útivølli, og hóast hetta á pappírinum ljóðaði nakað lættari, so tóku kollfirðingarnir sær ikki av løttum í Runavíkini.

Sæð burtur frá frá fyrsta góða korterinum, har vertirnir vóru væl við, so vóru tað kollfirðingarnir, sum sótu á tí mesta, og tá Tjaldur framvegis ikki tykist hava orku at spæla ein heilan dyst, so tók av álvara at dragna undan steðginum.

Fyrstu løtuna eftir steðgin punkteraðu kollfirðingarnir dystin fullkomuliga, tá teir øktu úr 16-11 í 23-13, og so var sum so ikki meira at spæla um. Við eitt sindur størri nærlagni kundi sigurin enntá verið væl størri, men tað kann sum so vera tað sama. Týdningarmest var, at stigini vórðu fingin til høldar, og hetta varð eisini gjørt uttan stórvegis hóvasták.

### Nærkast oddinum

Sum úrslitini í hinum dystunum lagaðu seg, so merkti úrslitið, at KÍF eftir eina stigaleysa byrjan nú bert er fýra stig frá avgjørda oddinum, har StÍF, Neistin og VÍF eru púrasta ájøvn.

Hvørt tað veruliga skal eydnast kollfirðingunum at ota seg heilt nær toppinum, fæst kanska ein góð ábending um, tá teir sunnudagin taka ímóti StÍF.

Hjá Tjaldri vil hinvegin einki bera til í løtuni, men onkrir glottar eru tó kortini at hóma. Sverri Justinusse ner loksins komin við aftur á liði, og tá Mortan Hansen innan alt ov leingi aftur sleppur at royna seg í dysti, kann væl vera, at teir fara at arga, men skal hetta gerast veruleiki, er helst neyðugt, at venjingarstøðan á liðnum verður betrað, soleiðis at orkan er til staðar í 60 minuttir.

### Dysturin í tølum

**Tjladur-KÍF 21-32 (11-16)**

Málskjúttar:
Tjaldur: Dragisa Stojovic 9(5), Sverri Justinussen 3, Ken Bærendsen 3, Arnfinn Langgaard 2, Zoran Sarcevic 2, Áki Hansen 1, Tórhallur Thomsen 1
KÍF: Damir Oros 9(2), Vagnur Johannesen 8, Petur Martin Poulsen 6, Hallur Hansen 3, Kristian Madsen 3, Jónálvur Johannesen 2, Mirko Milinkovic 1
Brotskøst: Tjaldur 5, KÍF 2
Útvísingar: Tjaldur 1, KÍF 2
Diskvalifikatión: Tjaldur 1 (beinleiðis reytt)